**Høvuðssáttmáli**
**millum**
**Føroya Arbeiðarafelag**
**og**
**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

## §1.

**a** Fyri alt fyrifallandi dagleiðaraarbeiði so sum reingerð, lossing, lagur, pakkhús, fiska og saltarbeiði verður grundlønin 87,96 kr.

**b** Fyri sildaarbeiði verður goldin viðbót upp á 0,07 kr. um tíman.

**c** Fyri arbeiði á sildaverksmiðjum verður goldin viðbót upp á 0,07 kr. um tíman.

## §2.

Fyri útgrevstur, uppruddan á byggiplássum, kolarbeiði, skitið og ónossligt arbeiði, sement, betong, stoypi, jarnbindingar, vatnbyggi, asfalt, tjøru, grótarbeiði og arbeiði á sleipistøð at skrubba botn á skipi uttan og smyrjing av skipi uttan upp til lúnning og málingaarbeiði við sproytu á skipasmiðju verður grundlønin 87,96 kr. um tíman 0,32 kr. í viðbót um tíman.

## § 3.

**a** Fyri arbeiði við grótjótrara, fyri passan av motorum, kompressarum, spølum og líknandi í sambandi við byggiarbeiði. Fyri passan av kranum. Fyri koyring av traktorum, dumparum og líknandi amboðum, so sum vegtrumlum, hydrauliskum gravi- og borivognum og betongbilum verður grundlønin 87,96 kr. um tíman + 3,66 kr. í viðbót um tíman.

**b** Fyri at løða og spreingja og grótboran verður grundlønin 87,96 kr. um tíman + 5,67 kr. í viðbót um tíman. Verða hjálparmenn tiknir til løði- og spreingiarbeiði fáa teir somu løn so leingi sum teir fáast við hetta arbeiði.

**c** Fyri tunnilsarbeiði verður grundlønin 87,96 kr. um tíman + 5,17 kr. í viðbót um tíman.

**d** Fyri at reinsa ketlar, vatntangar á skipi, oljutangar, lýsitangar og smeltitól og reinsan av kloakk og kjøli innan í skipi verður grundlønin 87,96 kr. um tíman + 5,98 kr. í viðbót um tíman.

## §4.

Grundlønin hjá bilstjórum og gaffiltruckførarum fyri tey í grein 1 nevndu arbeiðum og fyri at standa við spæl á skipi undir lossing verður 87,96 kr. um tíman + 1,28 kr. í viðbót um tíman.

Grundlønin hjá bilstjórum og gaffiltruckførarum fyri tey í grein 2 nevndu arbeiðum verður 87,96 kr.+ 1,77 kr. í viðbót um tíman.

Fyri at koyra kranvogn og tankvogn verður grundlønin fyri tey í grein 1 nevndu arbeiðum 87,96 kr. um tíman + 3,92 kr. í viðbót um tíman og fyri tey í grein 2 nevndu arbeiðum verður grundlønin 87,96 kr. um tíman + 4,39 kr. í viðbót um tíman.

## §5.

Ungdómar 14 ár fáa 50 %, 15 og 16 ár fáa 75 % av vaksnamannalønini bæði fyri normal og yvirtíð. 17 ára gomul fáa fulla løn.

## §6.

Afturat omanfyristandandi lønum verður roknað prístal sambært løgtingslóg nr. 36 frá 21. mai 1975 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn.

## §7.

**1.** Yvirtíðarlønin verður fyri øll arbeiði roknað av fullari normalløn soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Tá normalarbeiðstíðin er 07-16 | Frá kl. 16-20: | 35 % |
| | Frá kl. 20-07: | 60 % |
| Tá normalarbeiðstíðin er 08-17 | Frá kl. 17-21: | 35 % |
| | Frá kl. 21-08: | 60 % |
| Tá normalarbeiðstíðin er 09-18 | Frá kl. 18-22: | 35 % |
| | Frá kl. 22-09: | 60 % |
| Leygardagar | Frá kl. 08-24: | 65 % |
| Sunnu- og halgidagar | Frá kl. 24-24: | 100 % |

**2.** 1. mai er heilur frídagur. Flaggdagur, páskaaftan, hvítusunnuaftan, 1. november og jólaaftan eru hálvir frídagar. Átrokandi arbeiði, sum verður gjørt 1. mai og eftir kl. 12.00 hesar dagar verður lønt við dupultari normalløn, so leingi halgan varar.

Sambært lóg nr. 353, 7. August 1992 er grundlógardagur hálvur frídagur.

**3.** Um arbeiði byrjar í summarhálvárinum (summarhálvárið verður at rokna frá 1/5 til 31/10) fyri kl. 4 og í vetrarhálvárinum fyri kl. 5 verður ikki niðurfarið í løn fyrr enn høvi hevur verið at fáa svøvn. (Við svøvn skilst at hava verið burtur frá arbeiðsplássinum í 6 tímar).

## §8.

**1.** Normalarbeiðstíðin skal vera 8 tímar um dagin frá mánadegi til og við fríggjadegi og skal tann dagliga arbeiðstíðin liggja millum kl. 7 á morgni og kl. 18 á kvøldi, hetta soleiðis sum partarnir á teimum einstøku arbeiðsplássunum nærri semjast um.

Vanligur meiriluti á arbeiðsplássinum skal vera fyri hesum, og atkvøðast skal við seðlum.

Er á arbeiðsplássinum gjørd semja um, at normalarbeiðstíðin skal liggja millum kl. 07.00 á morgni og kl. 16.00 á kvøldi, skal hetta vera galdandi fyri alt arbeiðsplássið.

Er á arbeiðsplássinum gjørd semja um, at normalarbeiðstíðin skal liggja millum kl. 08.00 á morgni og kl. 17.00 á kvøldi, skal hetta vera galdandi fyri alt arbeiðsplássið.

Er á arbeiðsplássinum gjørd semja um, at normalarbeiðstíðin skal liggja millum kl. 09.00 á morgni og kl. 18.00 á kvøldi, skal hetta vera galdandi fyri alt arbeiðsplássið.

Har eitt arbeiðspláss natúrliga kann býtast upp í fleiri deildir, kunnu ymsar arbeiðstíðir avtalast millum arbeiðsfólkið saman við álitisfólkið og virkið, sum frávíkja normalarbeiðstíðini. Atkvøðast skal við seðlum. Hesar arbeiðstíðir skulu liggja millum kl. 07.00 og 18.00 og skulu stjórnirnar hjá meginfeløgunum hava hesar avtalur, sum skulu vera skrivligar, til góðkenningar. Um meginfeløgini ikki áðrenn 14. dagar hava fráboðað annað verða avtalurnar at meta sum góðkendar.

Um avtalað verður gjørd við arbeiðsfólkið í einari serstakari deild um frávik frá normalarbeiðstíðini smb. omanfyristandandi, so skal nýggja arbeiðstíðin hjá hesum starvsbólki metast sum normalarbeiðstíð, soleiðis at arbeiðið uttan fyri hesa tíð verður roknað sum yvirtíð sambært grein 7.

Døgurðatíðin skal vera 1 tíma og skal liggja millum kl. 12 og 13. Verður arbeitt í døgurðatímanum, skal dupult normalløn vera goldin, tó sunnu- og halgidagar dupult sunnudagsløn. Kemst ásamt um aðrar etingartíðir, skal tó ongantíð vera meira enn 4 tímar millum hvønn verð. Einki verður goldið fyri mattíðirnar. Arbeiðsformaðurin skal varskógva, tá ið mattíð er.

Verður arbeitt yvirtíð, skal varskógvast, áðrenn farið verður til døgurða. Verður ikki varskógvað áðrenn døgurða, verður nátturðatímin, sum í hesum føri skal liggja millum kl. 18 og 19 ikki frádrigin, um byrjað verður aftur kl. 19. Verður arbeitt longur enn til kl. 20 uttan at farið hevur verið til nátturða, verður yvirtíðarsatsurin frá kl. 21 at koma í gildi frá kl. 19.

**2.** Døgndrift skal ganga í skiftum. Øll ídnaðarvirki, ið vanliga kunnu hava 3-skifti vakt, koma undir heitið døgndrift. Um døgndriftsarbeiði á fiskavirki røkkur styttri enn 3 samdøgur samanhangandi og á øðrum ídnaðarvirki styttri enn 5 samdøgur samanhangandi verður hetta arbeiði avroknað sum vanligt arbeiði og goldið samsvarandi hesum, eisini hvat yvir- og nátttíð viðvíkur.

Í døgndrift verður lønin henda:
Frá kl. 08-16 vanlig normalløn
Frá kl. 16-24 vanlig normalløn + 575 oyru um tíman
Frá kl. 24-08 vanlig normalløn + 775 oyru um tíman.

Hesar viðbøtur vera ikki prístalsviðgjørdar. Mattíð við døgndrift verður ikki frádrigin.

Gongur døgndriftsarbeiðið um weekend, sunnu- og halgidagar, skal hetta avroknast sum weekend, sunnu- og halgidagar, men kann hetta tó ikki bróta 3- og 5-samdøgursregluna.

**3.** Á ídnaðarvirkjum kann arbeiði fara fram í 2 skiftum, 8 tímar hvørt, við nøkunlunda eins stórum holdum, sum skiftast um vaktirnar hvørja viku.

Um skiftivaktararbeiði á fiskavirkjum røkkur styttri enn 3 samdøgur samanhangandi og á øðrum ídnaðarvirkjum styttri enn 5 samdøgur samanhangandi verður hetta at avrokna sum vanligt arbeiði og goldið samsvar-andi hesum, eisini hvat yvir- og náttíð viðvíkur. Við

samráðing arbeiðaranna og arbeiðsgevaranna millum, kann arbeiðstíðin leggjast millum kl. 07-24 og lønin verður henda:

**I.** holdið: Vanlig normalløn.

**II.** holdið: Vanlig normalløn + 5,75 kr. um tíman.

Henda viðbót verður ikki prístalsviðgjørd. Mattíðin verður ikki frádrigin fyri II. holdið.

Yvirtíð - um arbeitt verður meira enn 8 tímar á vaktini - við skiftivaktar-arbeiði eins og sunnu- og halgidagsarbeiði verður goldið eftir § 7.

Sunnu- og halgidagar skulu ikki bróta 3- og 5-samdøgursregluna.

***Protokollat úr semingsprotokollini:*** Viðvíkjandi døgndriftsarbeiði har trot er á fólki, er stjórn Føroya Arbeiðarafelags samd um, at er ynski frá avvarandi arbeiðara- ella arbeiðskvinnufeløgum um at víkja frá tíðarbýtinum í døgndrift, vil stjórnin viðgera hetta ynski við vælvild.

Um arbeiðarar, sum arbeiða døgndrift í 3 skiftum ynskja at broyta arbeiðstíðina, skal henda broyting í hvørjum føri góðkennast av stjórn Føroya Arbeiðara-felags.

Mat og drekkatíð í døgndrift verður at praktisera, sum hon higartil hevur verið á teim ymsu arbeiðsplássunum og í teim ymsu arbeiðum.

Somuleiðis verður í øðrum arbeiði drekkatíð at praktisera, soleiðis sum hon higartil hevur verið á teim ymsu arbeiðsplássunum og í teim ymsu arbeiðunum.

### § 9.

**a** Á hvørjum arbeiðsplássi hava arbeiðararnir rætt til at velja sær álitismann. Nærri reglur fyri álitismenn eru skrásettar í serligari skipan í millum feløgini.

**b** Nevndarlimir í fakfelag hava rætt til frí frá arbeiði sínum í sambandi við nevndararbeiði, samráðingar og skeiðluttøku. Fráboðan skal gevast arbeiðsgevaranum beinanvegin tá nevndarlimur fær fundarboð.

### § 10.

Tá arbeiðsfólk eftir tilsøgn møta til arbeiðis, og arbeiðið ikki verður útint, skulu tey hava løn 2 tímar, ella um arbeiðið byrjar aftan á eina ásetta tíð, skulu tey hava løn fyri ta tíð, tey hava bíðað.

### § 11.

Arbeiðslønir verða at gjalda eina ferð um vikuna. Við útgjaldingina skal vikuseðil fylgja við. Arbeiðslønir verða at gjalda gjøgnum løngjaldsstovur, ið eru og verða settar á stovn har arbeiðarafeløgini ynskja tað, annars sambært galdandi lóg.

## § 12.

Um arbeiðsfólk kemur til skaða undir arbeiði, og tað kann prógvast við læknaváttan, at tey eru óarbeiðsfør, verða 2 dagølnir goldnar teimum við helvt av arbeiðsgevara og arbeiðara- ella kvinnufelag.

Aftaná nevndu 2 dagar verður goldið 20 % av 8 daglønum við sama helvtarbýti.

## § 13.

**a** Har arbeiði og líkindi eru til, at akkord kann fara fram, er hetta loyvt, tó kunnu stjórnirnar hjá meginfeløgunum krevja sær hesar til góðkenningar. Verður álagt at arbeiða yvirtíð við akkord, verður lønin at hækka sambært yvirtíðarlønini í grein 7.

**b** Lønaravtalur fyri spesialarbeiðarar kunnu gerast millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri arbeiðsfólk á ávísum virkjum, tó ikki fiskavirkjum. Har tílíkar avtalur verða gjørdar, er lønin sambært høvuðssáttmála + kr. 2,25 um tíman.

## § 14.

Hvør arbeiðsgevari hevur rætt til at hava ein formann, ið ikki nýtist at vera limur í nøkrum felag.

## § 15.

Arbeiðsmannafelagslimir, ið eru í einum arbeiði, eisini akkordarbeiði, eiga ikki rætt til at rýma úr tí fyri at taka upp lossingar- ella annað arbeiði og harvið forða øðrum arbeiðsleysum í at fáa arbeiði. Ei heldur er loyvt arbeiðsgevarum at læna fólk sínámillum, uttan tá arbeiðsfólk ikki fæst. Tó hevur viðkomandi arbeiðsgevari, ið lænir fólk sítt út, ikki loyvi at taka nýtt fólk í arbeiði, so leingi tey, ið eru lænt, ikki eru komin aftur í arbeiði hjá sama arbeiðsgevara.

## § 16.

Fyri vaktarmenn á skipum við bryggju á nátt er lønin kr. 535 fyri náttina. Náttin er frá kl. 21-08.

Har arbeitt verður á vaktini umborð við øðrum enn sjálvum vaktararbeiðinum skal løn gjaldast vaktarmanninum samsvarandi ásetingunum í hesum sáttmála.

Arbeiðari, sum hevur tilkallivakt,verður frá mánadegi til og við fríggjadag kl. 24.00, løntur við 14,00 kr. um tíman. Eftir fríggjadag til vanliga arbeiðstíð mánamorgun, verður arbeiðari løntur við 28,00 kr. um tíman.

Verður arbeitt í tilkallitíðini verður løn goldin sambært grein 7. Tó skal henda áseting ikki føra við sær, at vaktargjøld eftir skipanum, sum nú er í gildi, verða lækkað.

## § 17.

Í einum og hvørjum arbeiði, sum varar longur enn tríggjar mánaðir, verður fyri tímalønt arbeiði uppsagnarfreistin frá arbeiðsgevara henda:

Minni enn 6 mánaðar starvstíð 5 arbeiðsdagar.
Meira enn 6 mánaðar starvstíð 7 arbeiðsdagar.
Meira enn 1 ára starvstíð 10 arbeiðsdagar.
Meira enn 2 ára starvstíð 15 arbeiðsdagar.
Meira enn 3 ára starvstíð 20 arbeiðsdagar.

Uppsagnarfreistin frá arbeiðara síðu verður aftaná 3 mánaðir: 5 arbeiðsdagar.

Hetta er tó ikki galdandi, tá steðgur kemur í arbeiði vegna rávørutrot ella veður.

### § 18.

Fyri at seta á stovn sjúkra- og arbeiðsloysisgrunn og fyri at stuðla onnur týðandi endamál innan fyri meginfelagsskapin Føroya Arbeiðarafelag verður 1 % av lønini frádrigið, áðrenn hon verður útgoldin. - Har løngjaldsstovur eru, verður % avtikið gjøgnum tær.

Somuleiðis skal tað %, sum lokalfelagið skal hava, verða frádrigið, áðrenn lønin verður útgoldin.

Hesin peningur verður inngoldin av arbeiðsgevaranum til Føroya Arbeiðarafelag/ lokalfelagið sambært manningarlista og kontoavriti, samstundis sum lønin verður flutt.

### § 19.

**a** Verður ósemja um arbeiði, sum ikki er tilskilað í sáttmálanum, skulu feløgini beinanvegin upptaka samráðingar um arbeiðs- og lønarviðurskifti hesum viðvíkjandi áðrenn farið verður til gerðarrætt.

**b** Allar trætur um rættu fatan av sáttmálanum verða avgjørdar av einum gerðarrætti. Føroya Arbeiðarafelag velur 2 limir, Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 limir, og hesir 4 velja ástøðumann. Semjast teir ikki um hann, setir rætturin hann.

**c** Um gjørligt, skal avgerðin fyriliggja seinast 3 mánaðir aftaná, at gerðarrætturin er settur.

### § 20.

1. mai 2002 hækkar grundlønin við 4,24 kr. um tíman, eisini fyri sersáttmálarnar.

### § 21.

Sunnu- og halgidagsarbeiði arbeiðaranna er einans loyvt har vandi er fyri, at virði í sambandi við framleiðslu landsins fara fyri skeyti.

### § 22.

Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag plikta seg bert til at taka til arbeiðis limir í føroyskum arbeiðsmanna- og kvinnufelag.

Arbeiðsmanna- og kvinnufelagslimir mugu ikki arbeiða hjá arbeiðsgevara, sum ikki er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevari er tann, sum í vinnu síni fram um húski sítt hevur meira enn ein mann í arbeiði.

Ásetanin í hesi reglu umfatar ikki almennar stovnar.

Arbeiðsgevari ella umboðsmaður hansara hevur skyldu at krevja framvísan av arbeiðsloysiskorti, tá nýtt fólk verður tikið í arbeiði.

### § 23.

Fyri árliga høvuðsreingering verður veitt eykaviðbót upp á 7 kr. um tíman.

### § 24.

Fyri eitt og hvørt arbeiði fær hvør tann, sum luttekur í arbeiðinum, løn fyri í minsta lagi 2 tímar, sjálvt um arbeiðið er styttri.

### § 25.

**a** Fyri almenn arbeiði, ið liggja so langt uttan fyri bygdina, at neyðugt er at flyta arbeiðararnar, verða teir at fáa frían flutning til og frá við løn fyri koyritíðina fyri úttúrin.

**b** Tá ið menn verða sendir í burturarbeiði, eiga teir fult vistarhald og ferðaútreiðslur goldnar og løn fyri ferðingartíðina og annars eftir sáttmálanum.

**c** Verður arbeiðsfólk boðsent av arbeiðsgevara í aðrari bygd til arbeiði, ið er bráfeingis, og er so langt ímillum, at neyðugt er at flyta arbeiðararnar, eiga teir frían flutning. Hetta er tó ikki galdandi fyri arbeiðarar, sum frammanundan eru í føstum arbeiði hjá viðkomandi arbeiðsgevara.

### § 26.

Á øllum støðugum arbeiðsplássum, har fleiri fólk eru í arbeiði, eigur so vítt gjørligt at vera rúm til etingar og klæði. Hesi rúm eiga at vera upphitað.

Á arbeiðsplássum, har serligur búni verður kravdur, hevur virkið skyldu til at lata slíkan búna, móti at arbeiðsfólkið rindar depositum svarandi til innkeypsprísin, soleiðis at hesar upphæddir vera goldnar arbeiðsfólkinum aftur, tá tey lata virkinum arbeiðsklæðini aftur.

Hendan afturgjalding av depositum fer fram uttan mun til, um arbeiðsklæðini eru slitin ella ikki.

### § 27.

Arbeiðsgevararnir rinda 1 % av arbeiðslønini til lívstrygging og onnur sosial endamál.
Prosentið verður útgoldið saman við lønini.

Til avgerð er tikin um nýtsluna av frammanfyri nevnda peningi verður prosentið goldið á bundna konto í peningastovni í navni hjá viðkomandi arbeiðarafeløgum, sum undirskrivað hendan

sáttmálan. Føroya Arbeiðsgevarafelag fær útflýggjað reglugerðir, sum verða gjørdar í sambandi við nýtsluna av frammanfyri nevnda prosentgjaldi.

Arbeiðsgevararnir rinda frá 01.05.1997 at rokna 1 % av arbeiðslønini í eftirlønargrunn hjá Føroya Arbeiðarafelag. Hetta prosentið verður útgoldið í grunnin samstundis sum lønin verður goldin.

Gjaldið hækkar til 2,8 % tann 01. mai 2001
Gjaldið hækkar til 3,6 % tann 01. mai 2002

## § 28.

Hesin sáttmálin kann sigast upp av øðrum partinum við 2 mánaða freist til ein 1. mai, fyrstu ferð 1. mai 2003.

Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. mai 2001.

**Tórshavn 28. mai 2001.**

| **Føroya Arbeiðarafelag** | **Føroya Arbeiðsgevarafelag** |
|---|---|
| Ingeborg Vinther | Vilhelm M. Johannesen |
| Elias Hansen | Kristoffur Laksá |
| Georg F. Hansen | Gudmund Mortensen |
| Marius Clemmentsen | Bergur Poulsen |
| Laila Zachariasen | Magni Arge |
| Margretha Rasmussen | Leivur Mikkelsen |
| Harry Benjaminsen | Jóhan Páll Joensen |